einfaldari

- ger tað einfaldari

Desember 2012

# TEENSTREET 2013

TeenStreet 2013 verður í Offenburg í Týsklandi í døgunum 27. juli – 3. august. TeenStreet er ein altjóða ráðstevna fyri kristnar tannáringar. Endamálið er at arbeiða saman við kirkjum og samkomum til tess at geva ungum kristnum íblástur til at hava ett inniligt samband við Jesus og at lata hann verða endurspeglaðan í teirra gerandisdegi.
Sí meira á www.teenstreet.fo

## Presentera Hann sum Frelsara heimsins!



Á Daley Plaza í Chicago hevur ein katólsk kirkja hvørt ár eina stóra framsýning av Jesusbarninum í krubbuni og alt rundan um tað. Í 1999 varð Jesusbarnið stolið úr krubbuni. Teir fangaðu gerningsmenninar og fingu Jesusbarnið aftur. Nú boltaðu teir Jesusbarnið til krubbuna, fyri at hann kundi fáa frið. Hetta hjálpti ikki, tí í 2004 hendi tað sama aftur. Hesaferð var tað ein 19 ára gamal drongur, sum kláraði at loysa Jesusbarnið og fara avstað við tí. Tá teir umsíðir fingu fatur í dronginum og Jesusbarninum, øktu teir trygdina enn meir. Hvørji jól er ein bólkur av fólkum, sum kalla seg "The God Squad" (Gud-patruljan), og heldur vakt yvir Jesubarninum, fyri at tað skal fáa frið at liggja í krubbuni.

Hesa tíðina á árinum minnast vit søta lítla Jesusbarnið, sum liggur í krubbuni í Betlehem. Sangirnir, ið vit syngja, og myndirnar, sum vit síggja, eru av einum lítlum, fittum, mildum, óskyldigum, nýpoleraðum barni, sum liggur í eini krubbu við eini gloriu sveimandi yvir høvdinum. Men spurningurin er, um vit ikki hava boltað Jesusbarnið til krubbuna og ganga um sum ein "Gud-patrulja" og verja okkara fatan av, at Jesusbarnið skal verða liggjandi har. Man tað ikki vera upp á tíðina, at onkur stjelur Jesusbarnið úr krubbuni og presenterar Hann sum Frelsara heimsins!

*Jógvan Zachariassen*

# Hendingar & tiltøk

## Dópur í Hebron




Dópur verður í Hebron á Argjum mánakvøldið 10. desember. Um onkur ynskir at verða doyptur, kann viðkomandi seta seg í samband við onkran í samkomuleiðsluni í Lívdini.

## Kórvitjanir í Lívdini



Sunnudagin 18. november hevði Lívdin vitjan av tveimum kórum: Dreingjakórinum undir Brúnni og Gentukórinum Kassia, sum sungu á familjumøtinum. Sunnudagin 25. november vitjaði kórið Aurora Borealis v/Ólavi Jøkladal.

## Ger trúgvin mun í IKTUS




Hósdagin 6. desember byrjar IKTUS at senda røðina: Ger trúgvin mun. Høgni Johannesen, Símun Absalonsen, Jenis av Rana o.fl. tala. Røðin er upptikin í Lívdini í oktober og november í ár. IKTUS sendir mikudag til leygardag kl.11:00, 16:00, 21:00 og 02:00. Sunnudag frá kl.14:30 og 21:00 verður endursent frá vikuni. Sí skránna og les meira á www.iktus.fo ella Facebook/Iktus

## Til lukku við hjúnabandinum



Leygardagin 17. november giftust í Siloa í Fuglafirði Anna Maria Erlingsdóttir Anthoniussen úr Fuglafirði og Sólberg Kárason Jacobsen úr Vági.

## Sig tað við Gud!



*Flemming Kofod-Svendsen*

Brot úr bókini "Døden, sorgen og håbet", sum Flemming Kofod-Svendsen, prestur og fyrrverandi fólkatingslimur og ráðharri, skrivaði eftir, at hann misti son, verdóttur og tvey abbabørn í flóðalduni í Asia annan jóladag 2004.

*"Det er ikke vanskeligt at tro på en almægtig Gud, når man har medgang i livet. Alting ser anderledes ud, når man beder og beder og hjælpen udebliver. Da føler man sig svigtet af Gud. Det dræbende er ikke, at du anklager Gud, men at du anklager ham uden at vende dig til ham med det, du anklager ham for. Det dræbende er, at du hvisker det inde i dig selv, ruller det rundt i dit eget sind og gør en indestængt bitterhed ud af det. Sig det til Gud, bryd gennem alle fromhedsforestillinger og mød frem hos Gud selv. Det er kun dette, det kommer an på: Gå lige til Gud med din bitterhed."*

## Altjóða leiðarastevnan 2013

Stóra leiðararáðstevnan The Global Leadership Summit (GLS) verður í Norðurlandahúsinum 11.-12. januar 2013.

Á ráðstevnuni verður ein røð av góðum fyrilestrum, sum verða hildnir av kendum og dugnaligum leiðarum. Fyrilestrarnir, sum eru frá ráðstevnuni í USA, eru á stórskíggja. Bæði mynda- og ljóðgóðska er í topp. Harafturat eru allir fyrilestrarnir tekstaðir til føroyskt.

Fyri fyrstu ferð á GLS í Føroyum verður ein live-samrøða á skránni. Tað er kendi føroyingurin í Norra Njál Djurhuus, offiserur hjá Frelsunarherinum, ið verður gestur á GLS. Les meira á www.gls.fo

## Innsavning til heilsuhjálp í Kambodja



*Durita og Pauli Djurholm*

Durita og Pauli Djurholm virka sum trúboðarar í býnum Siem Reap í Kambodja. Í Siem Reap búgva umleið 100.000 fólk, men kring býin eru hundraðtals bygdir, har fólkið í stóran mun er sera fátækt og illa fyri á mangan hátt. Nógv børn líða neyð og eru analfabetar. Tað er tí blivin ein partur av tænastuni hjá Duritu og Paula at hjálpa fólki á ymsan hátt.

Í sambandi við, at vit saman við børnum okkara og versoninum fara at vitja Duritu & Paula um jólini, hava vit tikið á okkum at savna pening inn í Føroyum til at keypa vitaminir at býta út og til heilsuhjálp av ymsum slagi. Vit vilja tí geva teimum, ið ynskja at stuðla arbeiðinum í Kambodja, høvi at stuðla arbeiðinum við heilsuhjálp við at flyta pening á konto 9181-162.456.5. Hetta er ein konta, sum Lívdin stendur fyri.

Flytingin kann merkjast "heilsuhjálp". Peningurin verður fluttur óskerdur og beinleiðis til Kambodja til nevnda endamál.

*Heilsan*

*Elin & Jens Wang fartlf. 219903*

## Bønarløtur í Lonini

Týskvøld kl. 20.00 eru bønarløtur í Lonini oman Hoydalar 28. Triðja hvørt týskvøld eru kyknubólkar.

**Skráin fyri týskvøldini desember 2012**

| | |
|---|---|
| Týskvøldið 4. desember | Bønarløta |
| Týskvøldið 11. desember | Bønarløta |
| Týskvøldið 18. desember | Kyknubólkar |

# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

## Sunnudagin 2. desember

Familjumøti kl. 10.30: Innsetan í leiðsluna
Hoyvíksmøti kl. 12.00: Bárður og Jógvan á Lakjuni luttaka


Bárður og Jógvan

## Sunnudagin 9. desember

Familjumøti kl. 10.30: Gloria Excelsis
– dýrd veri Gudi á hæddini
(Lukas 2:14)
Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Tú ert mín orsøk at geva
Talari: Jógvan Zachariassen


Jógvan

## Sunnudagin 16. desember

Familjumøti kl. 10.30: Magnificat – andi mín gleðist í Gudi
(Lukas 1:46-55)
Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Tú ert mín orsøk at gleðast (KVF møti)
Talari: Jógvan Zachariassen

## Sunnudagin 23. desember

Jólamøti kl. 10.30 Benedictus – signing og vón
(Bert eitt møti) (Lukas 2:36-38)


Jóhan

## Sunnudagin 30. desember

Familjumøti kl. 10.30: Nunc Dimittis – lat meg nú fara
(Lukas 2:29-32)
Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Tú ert mín orsøk at liva
Talari: Jóhan Syderbø

**Ungdómstiltøk:**
Alive: leygarkvøld kl. 21.00

* Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*